Neistin-Tjaldur 28-27 (15-13):

# Aftur tepurt hjá Neistanum



Roknast kann eisini við, at Stojinovic fer at gerast alt meira týdningarmikil, so hvørt sum hann verður innspældur á liðnum
Mynd: Álvur Haraldsen

**Tjaldur gav Neistanum ein veruligan hvøkk hóskvøldið, men tá dysturin varð avblástur, hevði Neistin enn einaferð vunnið ein tepran sigur**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Tað verður ofta sagt um tey góðu liðini, at av eyðkennum teirra er, at tey eisini megna at vinna sær stig á teimum »ringu« døgunum.

Nú skulu hesar reglur ikki fara t staðfesta Neistan sum ein upplagdan FM-vinnara, men er nakar sannleiki í reglunum omanfyri, so sær tað í øllum førum bjart út hjá elsta hondbóltsfelagnum í landinum.

Higar til hevur Neistin spælt tríggjar dystir, og í ongum av hesum hevur spælið borið á tann bógvin, at talan her er um ein FM-kandidat. Hinvegin hevur úrslitið av hesum dystum verið, at felagið hevur eina málúrtøku upp á pluss trý mál, og fyri hesi hevur liðið fingið seks stig.

## Orkaðu ikki

Tað var annars ikki væntandi, at runavíkingar skuldu fara at geva Neistanum nakra serliga mótstøðu, tá teir mikukvøldið komu til Havnar.

Tjaldur hevur seinnu árini livað eina tilveru í botninum á stigatalvuni, og hóast liðið aftur í ár er styrkt við útlendskum leikarum, so bendi fyrsti dysturin ímóti Kyndli ikki á, at liðið fór at gera nakað við væntaðu oddaliðini.

Tað tóktist tó skjótt greitt, at Tjaldur ikki bert var komið til høvuðsstaðin fyri at fyri at fara norður aftur við einum sekki. Talan var kanska ikki um nakað flótandi hondbóltsspæl, men leikararnir stríddust sera væl, og tá so Sverri Justinussen av bakkinum og Mortan Hansen á strikuni ferð eftir ferð skoraðu, fór at síggja ikki sørt hugaligt út. Tað skal í hesum viðfangi nevnast, at fremsta orsøkin til málini hjá Mortani var leikandi venjarin, Zoran Sarcevic, sum ferð eftir ferð sendi hegnisligar sendingar inn á strikuna.

Hjá Neistanum gekk spælið á leið soleiðis, sum tað hevur gingið hetta kappingarárið. Uppspælið var aloftast trekt, og hóast tað hjálpti nakað, at Áki Mørk nú er farin undir hondbóltin aftur, so skerst ikki burtur, at tað fer at taka nakað av tíð, fyrr enn alt fólkið er veruliga samansjóvað.

Seinastu løtuna av fyrra hálvleiki gjørdist tó greitt, at heimaliðið í øllum førum hevði ein stóran fyrimun fram um gestirnar. Orkuna. Runavíkingarnir hava als ikki vant nóg leingi undan kappingini, og tí er grundvenjing teirra ikki komin í rættlag.

Hetta var eisini sjónligt, tá Neistin fram ímóti hálvleikssteðginum skoraði fimm ferðir á rað, harav fleiri av málunum komu eftir skjótálop, sum runavíkingarnir als ikki orkaðu at fylgja.

## Petur var munurin

Neistin hevði soleiðis eina leiðslu, tá teir komu út til seinna hálvleik, men tað var tó heilt skjótt, at teir høvdu tveitt hesa burtur.

Heldur enn at tátta skrúvuna og seta ferð á spælið, tóktist hugburðurin hjá leikarunum at vera »at tað gongur nokk«. Tjaldur vildi tað tó øðrvísi, og millum annað við góðum spæli frá málverjanum, megnaðu teir at broyta støðuna frá 15-13 til 17-19, og nú fór brádliga at sansa at hjá Neistanum.

Eina løtu var veruliga líkt til, at panikkur kom í spælið, og var tað ikki tí at innskifti Petur Magnusson sýndi satt stórspæl í málinum hesa løtuna, so kundi Tjaldur væl havt stongt dystin, tá teir einar tríggjar ferðir fingu bóltar forerandi, tá neistamenn gjørdu regulerar feilavleveringar í uppspælinum.

Petur megnaði tó í fleiri ferðir at verja fyri hesum, og spakuliga fóru tekinini um væntandi orkuna hjá mótstøðuni at vísa seg. Sjálvir royndu teir tó at mótvirka hesum, við at toga ferðina so langt niður, sum tað yvirhøvur var gjørligt, meðan Neistin hinvegin nú royndi at seta ferðina upp, og hetta eydnaðist sum so eisini. Trupulleikin var bara, at leikararnir einar tríggjar ferðir misnýttu úr purasta fríari støðu, og so gjørdist tað av álvara spennandi í seinasta minuttinum.

Við 40 sekundum eftir á klokkuni kom Neistin upp á 27-26. Tjaldur fór í álop, dríggjaði sær tíðina, og við sjey sekundum eftir smekkaði Sverri til. Neistin leyp avstað í álop, men tá dómararnir ikki høvdu floyta, máttu teir byrja umaftur. Teir fingu tó fýra sekund aftur frá dómarunum, og hetta var júst tað, sum teir høvdu tørv á. Eftir at hava givið bóltin upp, varð Ragnar Stakksund leiktur leysur, og alt endaði so við, at hann vann sær avgerandi brotskastið, sum Heini seti í netið.

## Okkurt er at hóma

Hóast tapið, so vóru fleiri tekin í dystinum um, at Tjaldur í ár fer at flúgva heldur hægri, enn teir hava gjørt undanfarnu árini.

Við altíð vandamikla Sverra Justinussen og frálíka samspælinum millum Sarcevic og Mortan Hansen tykist í øllum førum vera garanti fyri, at álopsspælið er á eini leið. Roknast kann eisini við, at Stojinovic fer at gerast alt meira týdningarmikil, so hvørt sum hann verður innspældur á liðnum, so eru onkrir aðrir trumfir eisini at hóma.

Hartvig Joensen hevur verið burtur frá fyrstudeildarhondbólti í nøkur ár, og enn er venjingarstøðan ikki nær námind tí optimalu, men hann hevur spælskil sum fáur, og tí kann stór nytta helst fáast úr evnum hansara, og fáa teir so eisini lokka ein ávísan fótbóltsmálverja at spæla aftur, fer brádliga at síggja heilt ljóst út.

Verjuparturin hevur aloftast verið veikasti liðurin hjá liðnum, og aftur hesa ferð sást, at her kann nógv betrast, men við nýggja málverjanum hava teir í øllum førum ein góðan hornastein, og kemur venjingarstøðan so eisini longur upp, kann liðið lættliga gerast eitt órógvandi element í kappingini hjá oddaliðunum.

## Minimalisma

Hjá Neistanum sær tað sum so eisini ljóst út. At fólkið er gott, er so einki at ivast í, og spurningurin tykist meira enn nakað annað at vera, nær liðið veruliga fer at swinga sum ein heild.

Higartil hevur talan meira enn nakað verið um minimalismu, men sum nevnt í byrjanini, so er hetta eisinni fyri eitt gott lið, og sum onkur klókur venjari eina ferð hevur sagt: »Skjýtur tú eitt mál meira enn hinir gjøgnum alt árið, so er einki at ivast í, at gullið er heima.«

Um hetta verður støðan hjá Neistanum, er so nakað heilt annað, men higartil hava tríggir dystir givið seks stig, og tað man nú ikki vera so galið kortini.

## Dysturin í tølum:

**Neistin-Tjaldur 28-27 (15-13)**

Málskjúttar:
Neistin: Heini Joensen 9(3), Hans Áki Dal-Christiansen 8, Jacob Jónsson 5, Áki Mørk 3, Kári Mortensen 2, Ragnar Stakksund 1
Tjaldur: Sverri Justinussen 8, Mortan Hansen 8, Hartvig Joensen 4(2), Dragisa Stojinovic 3, Zoran Sarcevic 2, Svein í Heiðunum 1, Dejan Lachuk 1
Brotskøst: Neistin 5, Tjaldur 6
Útvísingar: Neistin 5, Tjaldur 2
Dómarar úr Kyndli: Hannis Wardum & Uni Wardum. Hava longu dømt hópin av dystum í ár, og hava í hesum prógvað seg sjálvar sum eitt tiltrongt ískoyti til føroyska dómarahópin. Í so máta vikaði dysturin sunnudagin einki um støðu teirra.



# Toppdystir á Giljanesi og í Eysturskúlanum

**Í bestu kvinnudeildini verður toppdystur á Giljanesi hetta vikuskiftið millum Drátt og TB, og hjá monnunum hittast Fram og SÍ, sum bæði vunnu sínar fyrstu dystir**

FLOGBÓLTUR
*Emil L. Jacobsen*



*Tað er lagt upp til eitt brak av einum dysti í Eysturskúlanum í dag, og vinnarin leggur seg einsamallan á odda í deildini*

Í dag verður annað umfar í meistaradeildunum hjá kvinnum og monnum, og tað er eisini í dag, at kvinnurnar og menninir hjá Fleyr koma upp í kappingina. Sostatt hava øll liðini spælt, tá dystirnir í dag eru lidnir. Áhugaverdastu dystirnir í dag eru millum kvinnurnar hjá Drátti og TB og millum menninar hjá Fram og SÍ.

## TB er favorittur

Hjá kvinnunum verður áhugaverdasti dysturin uttan iva tann í høllini á Giljanesi millum Drátt og TB. Dráttur er føroyameistari og byrjaði kappingina í ár við at vinna 3-1 móti ÍF síðsta vikuskifti. Tað var ikki so óvæntað sum tað, at TB í sínum fyrsta dysti setti sigursvandu kvinnurnar hjá Mjølni so dyggiliga upp á pláss í Klaksvík og vunnu 3-0. Hóast TB er í eini heldur óhøgligari støðu við tað, at fleiri av leikarunum búgva og venja í Havn, so hava tær eitt sera sterkt lið í ár, og tað hava tær longu víst bæði í Fleyr-kappingini og móti Mjølni fyri einari viku síðani.

Dráttur hevur hinvegin mist fýra av leikarunum, sum vóru við til at vinna gull síðsta vetur, og tað slepst ikki undan, at tað merkist á liðnum. Tí verður TB ivaleyst favorittur í dag, men einki er avgjørt frammanundan.

Hin dysturin í meistaradeildini hjá kvinnum verður á Kambsdali millum ÍF og Fleyr. Hesi bæði liðini mugu við fyrsta eygnakast metast sum tey bæði veikastu í deildini, nú Fossánes hevur tikið sítt lið úr kappingini. Men ÍF megnaði at vinna eitt sett móti Drátti seinast, og á heimavølli eiga tær at kunna basa Fleyr.

## SÍ til Havnar

Meðan mesta flogbóltstosið á kvinnusíðuni seinastu tíðina hevur verið um TB, so er SÍ tað liðið, sum hevur fingið mest umrøðu hjá monnunum. Sørvingar tykjast vera ómetaliga væl fyri í løtuni, men dysturin í dag móti Fram verður ein verulig styrkiroynd hjá Borko & Co.

Fram vann síðsta leygardag 3-2 í einum undirhaldandi dysti móti Mjølni, og um nakar skal gera nakað við SÍ, kann tað gott verða Fram. Tað er lagt upp til eitt brak av einum dysti í Eysturskúlanum í dag, og vinnarin leggur seg einsamallan á odda í deildini.

Saman við Fram man Fleyr vera besta boðið uppá ein avbjóðara til SÍ, og teir byrja sína kapping í dag á Kambsdali móti ÍF. Fuglfirðingar vóru sannførandi í endaspælinum í vár og vunnu eisini meistaraheitið, men teirra byrjan hevur verið alt annað enn góð. Teir vórðu hølvaðir av í Sørvági, men nú fáa teir so møguleika fyri at fáa eitt sindur av uppreisn. Men liðið er viknað í mun til seinasta ár, og teir í Fleyr munnu eisini vera grammir eftir at fáa eina góða byrjan upp á kappingina, so tað verður ikki bara sum at siga tað hjá ÍF at venda gongdini.

Mjølnir hevur frí hetta vikuskiftið, og tað hevur so í staðin nakrar dómaraskyldur við sær. Næstu dystirnir hjá Mjølni vera heima móti ÍF um eina viku.

Dystirnir í meistaradeildini eru annars hesir.

**Kvinnur**
Dráttur-TB 13.00
Giljanes

**Kvinnur**
ÍF-Fleyr 13.00
Kambsdalur

**Menn**
Fram-SÍ 14.00
Eysturskúlin

**Menn**
ÍF-Fleyr 15.00
Kambsdalur

# Klassikarin livir enn

**Hóast tað ikki kann roknast við, at Kyndil fer at geva vestmenningum kapping í hondbóltsoddinum í ar, so er áhugin fyri stóra klassikaranum framvegis stórur millum manna**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Um vikuskiftið eru seks hondbóltsdystir á skránni, og hóast stórar broytingar eru farnar fram seinnu árini, so er lítið at ivast í, at stóri klassikarin á Hálsi verður tann, sum dregur flestar áskoðararnar.

## Æran telur

Dysturin, sum hugsað verður um, er sjálvsagt mansdysturin millum Kyndil og VÍF. Tá sagt verður, at hesin dysturin ikki longur er tann, sum hann áður hevur verið, er tað tí fyri fáum árum síðani var hesin aloftast ein av tveimum dystum, sum avgjørdu, hvat FM-gullið skuldi lenda.

Í ár tykist er tað tó soleiðis, at VÍF er risa stórur favorittur at vinna uppgerðina. Vestmenningar eru verandi meistarar, og í nógv størri mun enn Kyndil, so hava vestmenningarnir fíggjarligu orkuna, sum í dag er so alneyðug til at vera við í føroyska hondbóltsoddinum.

Traditiónin í einari slíkari uppgerð er tó somikið stór, at hóast hendan óreingjandi veruleika, so er eingin orsøk til at ímynda sær, at talan verður um nakran léttan dyst hjá vestmenningum. Æran í dystinum telur her nærum eins nógv, sum stigini verða, ið spælt verður um, og tí eru allar orsøkir at rokna við einum undirhaldandi dysti. Bæði liðini hava eisini nakað av trupulleikum við skaðum.

Hjá Kyndli verður vónað, at Janus Einar Sørensen nú er komin fyri seg aftur, eftir stoytin hann fekk í dystinum móti Neistanum. Hjá Vestmenningum noyddist Piddi Negru út seinast, og hann verður so ikki tøkur aftur enn á sinni. Hinvegin kom Áki Olsen tá í hansara stað, og hóast hann enn ikki er í nær námind fullari venjing, so kann yngri Olsen-bróðurin lættliga gera lívið súrt fyri mótstøðuverjurnar.

Annars verður eisini dystur á Skála um vikuskiftið. Strandingar og Kollfirðingar hava bæði fyrstu stigini til góðar, men hesa ferð verður so í øllum førum ein av pørtunum, sum fær nakað við sær.

Nærliggjandi er at rokna við, at tað verða strandingar, sum hava havt góð úrslit seinnu árini, men seinna kappingarhálva í fjør sýndi, at kollfirðingar eisini eiga at takast í álvara, so eisini her røkist fyri einum spennandi dysti.

## Favorittar

Hjá kvinnunum verða tríggir dystir leiktir um vikuskiftið, og harafturat varð ein dystur leiktur í Vágunum eftir evstamark okkara fríggjadagin.

Hesin var ímillum Sóljuna og Kyndil, og felags fyri hesi var undan dystinum, at týdningarmikið var at fáa stig, fyri at koma burtur úr botnstríðnum, sum bæði annars eru partur av.

Tey bæði liðini skulu í øllum førum ikki rokna við stigum, tá tey sunnudagin fara at dystast móti ávíkavist Stjørnuni og VÍF, sum bæði mugu roknast millum fremstu FM-kandidatarnar.

Teirra millum er VB eisini at finna, og eftir at tær seinasta vikuskifti taptu fyri VÍF, er einki at ivast í, at tær vilja vaska hetta av sær, tá tær leygardagin vitja botnliðið av Skála.



*Meira enn nakað annað verður tað helst æran, sum stendur upp á spæl, tá Kyndil og VÍF hittast á Hálsi sunnudagin*

Dystirnir um vikuskiftið eru annars hesir

**1. deild menn**
21/10
Kyndil - VÍF 16:00

21/10
StÍF - KÍF 16:00

**1. deild kvinnur**
19/10
Sóljan - Kyndil 18.30

20/10
StÍF - VB 14.30

21/10
Kyndil - VÍF 14.30

21/10
Stjørnan - Sóljan 14.30